Úrskurður Ítróttadómstólsins

viðvíkjandi kæru frá Róðrarfelagnum Knørri

um úrskurðin hjá dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya

Ítróttadómstólurin hevur viðgjørt kæru frá Róðrarfelagnum Knørri, dagfest 6. juli 2018 um úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 1. juli 2018 um róðurin hjá 5-mannaførum við gentum á Eystanstevnu tann 16. juni 2018 við kravi um, at avgerð Róðrarsamband Føroya um umróður skal standa við.

Í viðgerðini í Ítróttadómstólinum hava 5 nevndarlimir luttikið: Anna Rein, formaður, Eyðhild Skaalum, næstformaður, Jóhan Lamhauge, Børge B. Hansen, og Magnus Dam, nevndarlimir.

Semja er millum limirnar í Ítróttadómstólinum um, at allir limir eru gegnigir til at viðgera kæruna.

Kæran er innkomin rættstundis til Ítróttadómstólin.

Í reglugerð fyri Ítróttadómstól ÍSF er ásett í grein 1, stk. 2, at Ítróttadómstólurin kann í serstøkum førum viðgera eitt mál, sum verður fráboðað av einum, sum hevur grundaðan áhuga í tiknu avgerðini, hóast viðkomandi ikki var partur í málinum í fyrra málsviðgerðini. Ítróttadómstólurin ger vart við, at Róðrarfelagið Knørrur luttók við bátinum Tambar í róðrinum fyri 5- mannafør við gentum á Eystanstevnu tann 16. juni 2018. Tískil verður mett, at Róðrarfelagið Knørrur hevur grundaðan áhuga í tiknu avgerðini, hóast tað ikki hevur verið partur av fyrru málsviðgerðini.

Grundarlagið undir viðgerðini av kæruni:

- Kæra frá Hvalvíkar Streymnesar róðrarfelag til Róðrarsamband Føroya, dagfest 16. juni 2018
- Úrskurður hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 20. juni 2018
- Kæra frá Argja Róðrarfelag til Dómsnevndina hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 21. juni 2018
- Kæra frá Hósvíkar Róðrarfelag til Dómsnevndina hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 21. juni 2018
- Úrskurður hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 1. juli 2018
- Kæra frá Róðrarfelagnum Knørri til Ítróttadómstólin, dagfest 6. juli 2018
- Videoupptøka frá Róðrarsambandi Føroya av startinum hjá 5- mannafør við gentum, dagfest 16. juni 2018
- Dómaraváttan av róðrinum hjá 5- mannafør við gentum, dagfest 16. juni 2018
- Svar til Ítróttadómstólin frá Róðrarsambandi Føroya, dagfest 12. juli 2018
- Lógir og reglur hjá Róðrarsambandi Føroya
- Lógir og reglur hjá Ítróttasambandi Føroya

**Málslýsing**

Innleiðandi kann upplýsast, at í sambandi við viðgerðina hevur Ítróttadómsstólurin sent áheitan til Róðrarsamband Føroya um at útflýggja øll viðkomandi skjøl í málinum.

Hvalvíkar Streymnesar róðrarfelag kærir róðurin hjá 5- mannafør gentum á Eystanstevnu tann 16. juni 2018 til Róðrarsamband Føroya, tí at fleiri bátar byrjaðu at rógva, tá ið startdómarin rópti "klárir", og harvið tjóvstartaðu. Róðrarsamband Føroya gevur kæraranum viðhald og avgerð, at úrslitini frá róðrinum verða ógildaði og umróður verður á Jóansøku tann 23. juni 2018.

Argja Róðrarfelag og Hósvíkar Róðrarfelag kæra avgerðina hjá Róðrarsambandi Føroya til Dómsnevndina hjá Róðrarsambandi Føroya. Dómsnevndin hjá Róðrarsambandi Føroya vísir í sínum úrskurði til grein 9, 2. pkt. í reglur fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum. Dómsnevndin metir seg ikki hava heimild til at broyta meting dómarans í kapping. Dómsnevndin ógildar avgerðina hjá Róðrarsambandi Føroya við tí niðurstøðu, at róðurin og harvið úrslitini av róðrinum hjá 5-mannaførum við gentum á Eystanstevnu tann 16. juni 2018 standa við.

Róðrarfelagið Knørrur kærir úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsamband Føroya til Ítróttadómstólin við kravi um, at avgerðin hjá Róðrarsambandi Føroya um, at úrslitini frá róðrinum verða ógildaði og umróður verður, stendur við.

Í høvuðsheitinum snýr kæran frá Róðrarfelagnum Knørri seg um, at Róðrarfelagi Knørrur metir, at málið er so mikið álvarsamt, at tað heimilar eina gjøllari viðgerð. Í kæruni verður eisini víst á, at Róðrarfelagið Knørrur skilur, at dómarans avgerðir skulu virðast, men meta tó, at málið sum heild kann seta eitt keðiligt fordømi.

**Ítróttadómstólurin skal viðmerkja**

Avgerðin hjá Róðrarsambandi Føroya er tikin við støði í upptøkum hjá dómarunum úti á startstongini. Í avgerðini verður víst til upptøkurnar hjá dómaranum úti á startstongini, men ikki til nakrar ítøkiligar reglur.

Í úrskurðinum hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya verður víst til grein 9, 2. pkt. í reglur **fyri dómsnevndir innan ÍSF og viðgerð av kærum**. Dómsnevndin metir seg ikki hava heimild til at broyta meting dómarans í kapping.

Í grein 9, 1. reglubrot er ásett, at sersambond ella dómsnevndir kunnu gera úrskurð viðvíkjandi øllum virksemi og leiki innan sersambandið íroknað tulking av lógum og samtyktum, frátikið tó, 2) at broyta meting dómaras í kapping.

Í grein 9, 2. reglubrot stendur, at dómsnevnd RSF´s kann taka støðu til døming um raðfylgu sambært videoupptøkum á málinum.

Ítróttadómstólurin skal í hesum sambandi viðmerkja, at tá ið fyriliggjandi mál ikki snýr seg um døming av raðfylgu á málinum, er grein 9, 2. reglubrot ikki viðkomandi at brúka í fyriliggjandi kæru.

Í reglum hjá Róðrarsambandi Føroya **um døming** er ásett í grein 1, at høvuðsdómarin er hægsti myndugleiki á róðrarøkinum.

Í grein 19, 3. reglubrot stendur, at Róðrarsamband Føroya kann í heilt serligum førum yvirtaka leiklutin sum høvuðsdómari. Um hetta gerst neyðugt, skulu bæði umboðini hjá RSF á stevnuni og báðir startdómararnir vera samd/ir í hesi avgerð. Tað er einki í framlagda tilfari, sum bendir á, at Róðrarsamband Føroya skal hava yvirtikið leiklutin sum høvuðsdómari á Eystanstevnuni.

Sostatt kann ítróttadómstólurin staðfesta, at høvuðsdómarin hevur verið hægsti myndugleiki á róðrarøkinum undir róðrinum hjá 5-mannaførum við gentum.

Í somu reglum í grein 3 stendur, at aftan á startin og til bátarnir koma á mál, skal frá høvuðsdómarabátinum verða ansað eftir, at róðurin fer regluliga fram.

Í grein 12 er ásett, at startdómarin hevur heimild til at skjóta róðurin av upp til 20 sekund eftir startin. Við hesi áseting hevur startdómarin møguleika at eftirmeta, um eitt nú róðurin eigur at verða skotin av ella ikki. Tað er sostatt upp til startdómaran at meta um startin, soleiðis sum ásetingin eisini er ætlað til. Víðari er ásett í grein 12, 2. reglubroti, at hongur bátur eftir, skal róðurin skjótast av.

Í ítøkiliga róðrinum hjá 5-mannaførum við gentum á Eystanstevnu tann 16. juni 2018 varð róðurin ikki skotin av, og tí má ásannast, at eingin bátur hekk eftir. Heldur ikki hava dómararnir mett neyðugt at skjóta róðurin av, av øðrum orsøkum.

Í reglum hjá Róðrarsambandi Føroya **um Ávaringaskipan** er ásett í grein 6, 2. og 5. pkt., at gult kort verður givið, um róðrarbátur tjóvstartar ella um róðrarbátur hongur eftir, eftir at startað er. Í tilfarinum, sum Ítróttadómstólurin hevur fingið útflýggjað sæst ongastaðni, at nakar bátur hjá 5-mannaførum hjá gentum hevur fingið gult kort. Staðfestast kann, at dómararnir hava ikki hildið seg hava orsøk at nýta tær heimildir, ið teir hava sambært reglunum, og Ítróttadómstólurin sær ikki orsøk til at seta spurnartekin við hesa støðu dómaranna.

Í somu reglum í grein 9 er ásett, at Róðrarsamband Føroya hevur heimild til at revsa rógvarar, ið sýna ósømiligan atburð undir róðri. Revsingin er bót og/ella burturvísing frá kappróðri. Víst verður tá eisini til etisku leiðreglurnar "Góður atburður" hjá ÍSF.

Í reglum hjá Róðrarsambandi Føroya **um umsitingarliga døming og revsing** er ásett í grein 1, 4. pkt., at umsitingarlig revsing fevnir um 4) ósømiligan atburð. Grein 3 heimilar Róðrarsamband Føroya at revsa rógvarar, ið sýna ósømiligan atburð undir róðri. Sambært grein 3, 2. reglubrot er revsingin bót ella/og burturvísing frá kappróðri, umframt at senda frágreiðing um hetta til viðkomandi felag og rógvara.

Sostatt hevur Róðrarsamband Føroya heimild til at revsa við bót ella/og burturvísing vegna ósømiligan atburð. Einki er tó upplýst í málinum um, at Róðrarsamband Føroya hevur revsað rógvarar við bót ella burturvísing fyri at hava víst ósømiligan atburð undir róðrinum við heimild í reglum **um umsitingarliga døming og revsing** ella sambært reglum **um Ávaringaskipan**.

Hinvegin er tikin avgerð um at ógilda úrslitini hjá 5-mannaførum gentum og at áseta umróður.

Hóast tað í úrskurðinum frá Róðrarsambandi Føroya ikki verður víst til nakað ávíst lógargrundarlag, hevur Róðrasamband Føroya í skrivligum svari upp á fyrispurning frá Ítróttadómstólinum svarað, at Róðrarsamband Føroya hevur nýtt reglurnar **um umsitingarliga døming og revsing** sum heimild fyri sínum úrskurði. Í úrskurðinum fyri at døma umróður og harvið ógildað úrslitini frá róðrinum hjá 5-mannaførum við gentum á

Eystanstevnu vísir Róðrarsamband Føroya til grein, 1, 4. pkt., grein 3, 1. reglubrot og grein 4 í reglunum **um umsitingarliga døming og revsing**.

Í hesum reglum verður, sum omanfyri nevnt, heimilað Róðrarsambandi Føroya at revsa fyri ósømiligan atburð sbrt. grein 1, 4. pkt. Grein 3 heimilar at revsa rógvarar, ið sýna ósømiligan atburð undir róðri. Revsingin sbrt. grein 3 er bót ella/og burturvísing frá kappróðri, umframt at senda frágreiðing um hetta til viðkomandi felag og rógvara.

Í grein 4 er heimild hjá eini einmælt samdari nevnd hjá Róðrasambandi Føroya í serligum førum at taka umsitingarlig mál uppaftur til enduráskoðan, eftir at klagufreistin er lokin, og tá talan er um haldgóð prógv. Revsingin í slíkum førum er, at stig verða frádømd við afturvirkandi kraft. Tað er ásetingin í grein 4, ið Róðrarsamband Føroya hevur lagt til grund í sínum úrskurði um sjálva revsingina.

Ítróttadómstólurin skal í hesum sambandi viðmerkja, at viðvíkjandi tjóvstarti, sæst ikki í reglum og viðtøkum hjá Róðrasambandi Føroya nøkur heimild til at døma umróður og ógilding av róðri. Hinvegin hevur startdómarin heimild at skjóta róðurin av, og høvuðsdómarin hevur heimild til í ymiskum øðrum støðum at skjóta róðurin av. Hetta sæst í reglunum **um døming**.

Revsing fyri at tjóvstarta er, sum omanfyri nevnt, viðgjørd í reglum **um Ávaringarksipan**, og heimila hesar at geva gult kort umframt at reglurnar **um døming** heimila startdómaranum at skjóta róðurin av innan 20 sekund eftir startin. Í reglum **um ávaringaskipan** kann ein bátur verða kolldømdur eftir ávíkavist tvey og trý gul kort.

Umsitingarlig mál eru sbrt. grein 1 í reglunum **um umsitingarliga døming og revsing** 1) um luttøkuseðil ikki er í samsvar við róðrarmanning, 2) um rógvari/róðursmaður rør/stýrur í fleri bátum sama dag uttan loyvi frá RSF. Vísast skal til grein 7 í tilmelding, 3) um bátur ikki lýkur góðkenning RSF´s og 4) ósømiligur atburður.

Ósømiligur atburður er nágreinaður í grein 3 í reglum **um umsitingarlig døming og revsing** og í grein 9 í reglum **um ávaringaskipan**.

Grein 1 – 8 í reglum **um Ávaringaskipanina** hava saman við øðrum reglum til endamáls at avgreiða róðurin og geva dómaratoyminum neyðugu heimildirnar og amboðini til at avgreiða róðurin. Herundir at meta um og revsa tjóvstart. Heimildin, sum Róðrarsamband Føroya hevur sbrt. grein 9 í reglum **um Ávaringaskipanina** hava hinvegin til endamáls at revsa ósømiligan atburð, bæði undir róðri og í ferðing millum heimstað og róðrarstað.

Omanfyri nevnda regluverk ger eftir ítróttadómsstólsins meting endaliga upp við, hvussu tjóvstartur verður handfarin í sambandi við kappróður. Ítróttadómstólurin metir tískil ikki grundarlag vera fyri at staðfesta, at reglurnar um ósømiligan atburð eisini fevna um tjóvstart.

Tá endaliga er gjørt upp við avleiðingarnar av tjóvstarti í reglunum **um ávaringaskipan**, metir Ítróttadómstólurin, at tað ikki er heimilað nevndini í Róðrarsambandi Føroya eisini at taka avgerð um tjóvstart, uttan so, at grein 19, 3 reglubrot í reglum **um døming** er viðkomandi.

Staðfestast kann, at dómaratoymið ikki hevur nýtt sínar heimildir, sum lýst omanfyri.

Ítróttadómstólurin metir, at frammanfyristandandi reglur gera úttømandi upp við møguleikarnar at meta um og revsa í sambandi við tjóvstart, og av tí at eingin heimild finst í hesum reglum til fyrisitingarliga at strika

róður og døma umróður, fer Ítróttadómstólurin at staðfesta úrskurðin hjá Dómsnevnd Róðrarsambands Føroya.

**Úrskurður**

Grundað á frammanfyri standandi samtykti ein samdur Ítróttadómstólur at staðfesta úrskurðin hjá Dómsnevndini hjá Róðrarsambandi Føroya, tó við teirri grundgeving, at tað ikki er heimilað í reglum og viðtøkum viðvíkjandi kappróðri fyrisitingarliga at døma umróður ella ógilding av róðri í sambandi við tjóvstart.

Tórshavn 14. juli 2018

Vegna Ítróttadómstólin

Anna Rein
formaður